# peningur til gransking



*Tær fyrstu sjúkrasystrarnar, sum starvsheitið var fyrr, tóku prógv á skúlanum í 1963*



*Á skúlanum fáa tey lesandi nógva vitan um menniskjalikamið*

*Hálvt triðja ár eru tey lesandi í skúla, halvt annað úti og arbeiða*



búgvingin varð akademiserað, hevur skúlin ment eina ískoytisútbúgving à 30 ECST stig til bachelor í sjúkrarøktarfrøði. Teir fyrstu 26 sjúkrarøktarfrøðingar hava lokið prógv. Tað fyrsta árið søktu 108 um at sleppa inn til hesa útbúgving, so áhugin er sera stórur millum sjúkrarøktarfrøðingar at uppstiga til bachelor, og tað má sigast at vera ein stórur vinningur fyri Nærverkið og Heilsuverkið, at slík menning fer fram. Útbúgvingin verður nú boðin út fyri gjald, og leiðslan á skúlanum var bilsin, at 47 søktu inn til ta útbúgvingina, nú fyrtreytirnar eru broyttar. Tí er avgjørt. at allir umsøkjarir sleppa inn, men forskotið í tveimum flokkum, har annar byrjar í vár og hin í heyst.

## Góðar umstøður

Tað var eitt stort framstig, tá ið skúlin fyri fýra árum síðan flutti av Eirargarði í Jónas Broncksgøtu at vera.

− Umstøðurnar eru munandi betri, men tað slepst ikki uttan um, at hetta húsið er ein goymslubygningur við tjúkkum betongsúlum, og tí er torført at broyta innrættingina. Okkum vantar høli til bólkaarbeiði, og vit hava stóran tørv á eini betri útgjørdari venjingarstovu, ikki minst nú umstøðurnar á klinisku útbúgvingarplássunum broytast, og væntast kann, at alt fleiri viðgerðir á sjúkrahúsunum verða ambulantar, og plássini tí færri, sigur Súsanna Mortensen.

Í dag finnast dukkur, sum eru elekroniskar, soleiðis at viðgerðin, dukkan fær, sæst aftur á telduskermum. Við sovorðnum lærutóli kunnu lesandi læra víðkaða fyrstuhjálp, at leggja dropp og sondu, so tær eru betri fyri at royna seg í veruliga lívinum.

Við góðum vilja frá klinikkini hevur tað altíð eydnast at finna pláss til øll lesandi.

Tað er ikki óvanligt, at lesandi á skúlanum í Føroyum fara uttanlands í skiftislesnað, og ein avtala er um, at føroyskir lesandi kunnu fara bæði til Teilands og til Avstralia. Tað hevur tó eingin roynt enn.

Á sama hátt koma lesandi úr skandinavisku londunum til Føroya í skiftislesna.

− Tey halda tað vera so eksotiskt at sleppa til Føroya og vera í kliniskum plássi her. Serliga dámar teimum væl at vera í heimatænastuni. Tað skilja vit væl, tí alt her er so nógv øðrvísi, sigur Súsanna Mortensen.

## Læra kropskontakt

Arbeiðið sum sjúkrarøktarfrøðingur hevur altíð verið roknað sum eitt kvinnufak burturav, tí tað er bundið at kvinnuligum virðum. Kvinnurnar hava altíð havt uppgávuna at taka sær av børnum, gomlum og sjúkum, og tær hava tí ikki verið so bangnar fyri at nema við fólk.

Men her er ein broyting hend tey seinastu árini. Síðan røktarheimini komu, hava færri havt síni gomlu foreldur ella eina ommusystir heima at taka sær av, at skula vaska teimum og annað.

Óttin fyri tí næru kropskontaktini kom fyrr í Danmark, men nú uppliva lærararnir tað eisini her. Hetta er nakað, sum veruliga má arbeiðast við, tí tað er ein høg gátt at skula upp um at skula nema við sjálvt holdið á einum øðrum menniskja.

## Mugu granska

− Føðingardagsynskið hjá skúlanum er at fáa størri játtan, so lærararnir, eins og hini vísindastarvsfólkini á Fróðskaparsetrinum hava part av starvstíðini, har tey granska. Tað hevði verið gott at fingið meira vitan um sjúkrarøkt í Føroyum, og tað er heilt vist, at høvdu vit eitt granskingarumhvørvi, høvdu útlendingar eisini komið higar at granska, sigur Súsanna Mortensen.

Eitt annað føðingardagsynski hjá skúlanum er at kunna taka fleiri lesandi inn. 22 um árið er ov lítið, og verða ikki fleiri lesandi tikin inn um árið í framtíðini, verður fráfallið størri enn tilgongdin um nøkur ár.

Rektarin heldur, at arbeiðið sum sjúkrarøktarfrøðingur er eitt spennandi arbeiði, tí tað er at arbeiða við menniskjum við sínum sterku síðum og sínum veikleikum. Einki menniskja er eins, og tí verður heldur ikki nakar dagur í arbeiðinum líka.

− Sjúkrarøktarfrøðingar mugu brúka allar sínar eginleikum í yrkinum, og tað er ein stór avbjóðing, sigur Súsanna Mortensen.